FRÍ Í FØROYUM *Einki er sum summarkvøld við strendur*

SIGL



SIGL SAMAN VIÐ TÍNUM KÆRU

Royn nýggjar leiðir
ella leita aftur á gamlar
Stundin er komin

*Um tjúgu ár fert tú at angra tað,*
*tú ikki gjørdi, meira enn tað, tú gjørdi.*
*So loys frá landi.*
*Sigl út úr tíni tryggu havn.*
*Lat vindin fylla seglini.*
*Leita. Droym. Og finn.*
*(- Mark Twain)*

LOYSNIR 32 21 23

Ferðaráð Føroya

Suðuroyar Kunningarstova á Tvøroyri tel 37 24 80, Suðuroyar Kunningarstova í Vági tel 37 43 42,
Sandoyar Kunningarstova tel 36 18 36/22 20 78, Kunningarstovan tel 31 57 88, Kunningarstovan í Saltangará tel 44 94 49,
Kunningarstovan í Fuglafirði tel 44 48 60, Vága Kunningarstova tel 33 34 55, Norðoya Kunningarstova tel 45 69 39, Ferðaráðið tel 35 58 00

www.visit-faroeislands.com

Fakliga spennandi avbjóðingar bíða nýggjum fulltrúa

Ert tú royndur løgfrøðingur, sum hevur hug at spesialisera teg og arbeiða konsentrerað fakliga?

Ella ert tú ungur løgfrøðingur, sum ynskir góða barlast á yrkisleiðini? Og hevur tú samstundis áhuga fyri starvsfólkamálum?

Um so er, eigur tú at søkja tær henda møguleikan at arbeiða við fjøltáttaðum uppgávum innan starvsøkið, ið fevnir um starvsfólkamál.

**Sum dømi um uppgávur í starvinum kunnu nevnast:**
- Starvsfólkarættarlig viðurskifti, her uppi í lóggávuarbeiði, sáttmálatulking og rættarmál
- Sáttmálasamráðingar
- Málsviðgerð av flokkingarmálum
- Starvsfólkapolitiskir spurningar

Tú kemur at starvast á einum livandi øki og til tíðir í rokaligum umhvørvi, sum mennist og broytist alla tíðina. Eisini fært tú nógv samband við stovnar, fakfeløg og advokatar.

Starvið er avbjóðandi, og tað hevur týdning, at tú ert fyrikomandi, smidligur og støðufastur.

Vit leggja dent á, at Lønardeildin er vælvirkandi og professionel. Samstundis sum umheimurin fær eina góða tænastu frá okkum, skal hann fata okkum sum fakliga dugnalig. Tí bjóða vit tær upplæring og góðar skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikar í einum góðum arbeiðsumhvørvi við góðum samstarvsfelagum.

Hevur tú løgfrøðiliga kandidatútbúgving, eru setanartreytirnar eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelag Føroya.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast hjá Thomas Magnussen, stjóra, á telefon 35 22 00.

Vit skulu hava tína umsókn innan 5. juli 2004, kl. 12.00. Hon skal sendast til Fíggjarmálaráðið, Lønardeildina, Postboks 2039, 165 Argir.

Lønardeildin í Fíggjarmálaráðnum hevur ábyrgd av landsins arbeiðsgevaraheimildum, ið viðvíkja lønum og setanartreytum.

**Høvuðsuppgávurnar hjá lønardeildini eru tí:**
- at samráðast við fakfeløg um sáttmálar og avtalur fyri størv hjá landinum
- at umsita tænastumannalóggávuna
- at flokka størv og at góðkenna individuellar treytir
- at ráðgeva hinum ráðunum í arbeiðsrættarligum og setanarrættarligum spurningum

**Harumframt umsitur Lønardeildin eisini:**
- Góðkenning av leigusáttmálum, tá ið landið leigar frá øðrum
- Tann part av kommunustýrislógini, sum snýr seg um góðkenningar samb. § 5, stk. 5 av kommunalum sáttmálum og avtalum um lønar- og setanarviðurskifti v.m.

FØROYA LANDSSTÝRI Fíggjarmálaráðið



# Miðbýurin gerast meira livandi

**Ein heildarætlan er nú komin fyri Dr. Jakobsensgøtu/Sverri sgøtu í Havn, sum skal vera við til at gera miðbýin meira livandi**

HEILDARÆTLAN

*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Miðbýurin skal gerast meira livandi, er greiði boðskapurin frá Jan Christiansen, borgarstjóra í Havn.

Og fyri at tryggja, at so verður, er nú ein heildarætlan fyri Dr. Jakobsensgøtu/Sverrisgøtu samtykt í býráðnum.

– Byggisamtyktin fyri gøturnar er broytt soleiðis, at eigararnir kunnu fáa loyvi at byggja út, sigur Jan Christiansen.

Bygningarnir skulu eftir ætlan kunna vera í trimum hæddum. Tað vil siga kjallari umframt tvær aðrar hæddir.



*Ein heildarætlan er gjørd fyri Dr. Jakobsensgøtu/Sverrisgøtu, sum skal vera við til at styrkja miðbýin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Nógv virksemi

Sum er í dag, so eru nógvir handlar, matstovur og annað á hesum báðum gøtunum. Ætlanin er eisini at halda tað soleiðis.

Eitt av krøvunum hjá býráðnum er, at virksemi, sum verður í kjallaranum á matrikulognunum á gøtunum báðum, hevur nakað við gøtuna at gera. Tað vil siga, at tað skal vera ein matstova, handil, barr, frisørsalong ella líknandi. Sostatt verður talan ikki um skrivstovur, teknistovur, tryggingarfeløg og so framvegis.

Tað verður eisini møguligt hjá handlunum at byggja eitt lítið hálvtak útfrá handlinum. Jan Christiansen tekur dømi við Thomas Dam niðri í gongugøtuni.

## Ikki gongugøta

Heildarætlanin er samtykt fyri at styrkja hjartað í býnum, sigur borgarstjórin.

Í dag koyrir ferðsla eftir vegunum, og sum er nú, er onki, sum leggur upp til, at tað fer at broytast.

– Ferðslan koyrir rímiliga væl, men við at skipa økið betri, so vænti eg, at vit kunnu fáa eina glíðandi ferðslu, sum spakuliga koyrir, sum hon ger í dag, sigur Jan Christiansen.

Málið er longu samtykt í býráðnum og liggur nú til hoyringar, har øll kunnu gera viðmerkingar.

I-net BREIÐBAND



What a perfect date...!

SKUNDA TÆR! Síðsta freist at stovna Breiðband ókeypis*) er mikudagin 30. juni

Spar 750,- í stovning

- Upp til 20 ferðir skjótari enn uppringt samband
- Støðugt fast samband
- Tosa og surfa samstundis - ikki neyðugt við eyka linju
- Fleiri upplivingar á alnetinum

Ring 808080, vitja www.tele.fo ella eina telebúð og fá I·net Breiðband til júst tín tørv...

*) Treytað av at tú teknar I·net Breiðbandhald frá Føroya Tele í 6 mðr. Tilboðið er galdandi til og við 30. juni 2004. Montørgjald og mótald, ið kann keypast frá Føroya Tele, er ikki íroknað. Sí meira á www.tele.fo.

petur & petur • 320870

FØROYA TELE

